## Kysti kvinnu deyva

Ein kvinna í 20´unum í Kina mátti á sjúkrahús, eftir at sjeikurin hevði mussað hana. Kossurin var eftir øllum at døma so eymur, at kvinnan gjørdist deyv í øðrum oyranum. Hetta skrivar BBC. Og stóru bløðini í Kina ávara nú fólk ímóti at kyssast so ógvusliga, at tey fáa skaðar í oyruni. BBC skrivar, at kvinnan, sum gjørdist deyv, kann rokna við at hoyra aftur sum vanligt um tveir mánaðir.




## Dalurin fagurt ummæli

Skaldsøgan Dalurin Fagri eftir Gunnar Hoydal fær sera gott ummæli í danska blaðnum Berlingske Tidende. Forlagið Torgard hevur givið donsku týðingina av bókini út. Á donsku kallast skaldsøgan Dalen. Ummælarin hjá Berlingske Tidende heldur, at søgan hjá Gunnar Hoydal er vøkur, ræðandi og væl komponerað. Dalen fær 5 av 6 stjørnum frá Berlingske Tidende.

# ...ararnir eru bestir í flotanum

*Hevði ein dekkari verið við Vestmenningi og Fram hvønn túr í ár, hevði hann havt tjent heili 770.000 krónur, men við 2/3 av tíðini umborð, liggur inntøkan um stívliga 500.000 krónur*

*Mynd: Karstin Vang*



hetta eru bestu ísfiskatrolarar í 2008.

Vestmenningur og Fram eru fyrrverandi Hádegisklettur og Stígarklettur, sum á sinni vórðu smíðað á Tórshavnar Skipasmiðju og vórðu róptir dalstrolararnir.

Teir endaðu í Ný Sælandi, haðani teir vórðu keyptir aftur til Føroya í endanum av nítiárunum.

### Roktúrar

Skipini hava gjørt fleiri roktúrar í ár, bæði á upsa og í gullaksi.

Veiðan hevur verið góð tað mesta av árinum, og nógvar sølur hava eisini verið góðar. Skipini hava soleiðis eisini sett met í veiðinøgd og sølu fyri einstakan túr.

Aftur í morgun eru skipini inni við heili 580.000 pundum, sum tey fingu á Munkagrunninum og á Bill Baily Banka.

- Fiskurin, sum skipini hjá okkum fingu á Munkagrunninum, var góður upsi, tað mesta 3'arar blandað við 2'arum. Men kortini vísti tað seg, at onkur onnur skip, sum eisini royndu á Munkagrunninum, fingu smærri fisk, og hetta elvdi til, at rættiliga stórar leiðir vórðu stongdar.

Tummas Christophersen, reiðari, sigur, at Vestmenningur og Fram fóru av Munkagrunninum og suður á Bill Baily banka at royna. Har var upsin uppaftur betri, tað mesta 2'arar blandað við 1'arum.

- Hendan túrin royndu skipini í eina viku. Tey vóru eisini inni mánadagin í síðstu viku við 410.000 pundum.

Reiðarin sigur, at skipini í morgun seldu fyri 1,7 miljónir krónur, sum er góð søla.

- Prísurin er lækkaður nakað, men vit eru væl nøgdir við hendan túrin og søluna, har Faroe Seafood keypti meginpartin av fiskinum.

Eini 5-6 tons vóru av øðrum fiskasløgum, sum vórðu seld um uppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya.

### Gott ár

Við Vestmenningi og Fram eru tilsamans 14 mans umborð í senn, sjey við hvørjum skipi.

Knýttir at skipunum eru tilsamans 20 mans, og skiparar hendan túrin vóru vestmenningarnir, Helgi Nielsen og Arvid Petersen.

Tummas Christophersen sigur, at samlaða søluvirði í ár táttar í 37 miljónir krónur, sum er eitt lítið vet lakari enn besta árið hjá skipunum síðan januar ár 2000, tá tey fóru til fiskiskap undir nýggju eigarunum.

- Samlaða veiðan liggur omanfyri 8.000 tons, harav 5.500 tons er gulllaksur, sum skipini veiddu í vertíðini.

Reiðarin sigur seg vera væl nøgdan við inntøkusíðuna í hesum ári, men orsakað av høgu oljuprísunum, sum hava merkt hetta árið, er úrslitið hampiligt.

- Nú verður ikki farið útaftur fyri jólahøgtíðina, sigur Tummas Christophersen.

### Góð hýra

Manningarparturin umborð á Vestmenningi og Fram higartil í ár liggur um 770.000 krónur, og hetta hevði verið inntøkan hjá monnum, sum vóru hvønn túr umborð.

Men tað er eingin.

- Ein dekkari, sum hevur verið umborð 2/3 av túrunum, hevur eina ársinntøku, sum liggur um 515.000 krónur, sigur reiðarin, Tummas Christophersen í Vestmanna.